# valdan

Tað sama var í senatsvalinum. Í North Caroline nýtti Elisabeth Dole, ein av fremstu republikansku politikarum, á ivasomum grundarlagi tað vápn móti sínum kappingarneyta Kay Hagan, at hon var gudloysingur. Tá vísti tað seg, at hon var sunnudagsskúlalærari! Elisabeth Dole fall eisini so dyggiliga.

Hetta vísir, at (mis)nýtslan av kristindómi í politikki ikki longur loysir seg – í USA.

### Diddan ovurfegin

Diddan er sjálvsagt ovurfegin um úrslitið av valinum. Hon er ikki minni fegin um, at Obama vann so greitt í Californina, har hon býr. Hesin statur er so stórur, at hann er sera týdningarmikil fyri at verða valdur hjá einum forseta. Hann gevur nevniliga 55 valmenn av teimum 270, sum krevjast fyri at verða valdur.

Tá ið valið var greitt, varð sent Didduni teldupost, har ynskt var henni og Obama tillukku við sigrinum. Hennara viðmerking er henda:

"Takk fyri heilsanina. Dagurin 4. november verður skrivaður í søguna, og eg kenni tað sum framíhjárættindi at hava verið vitni til tað, sum hent er og kanska hava havt ein lítlan leiklut. Tá ið ein hugsar um, at bert góð 40 ár eru liðin síðan

"The Voting Rights Act" bleiv viðtikin, so kann ikki sigast annað enn, at hetta er ein stórhending. Hetta var lógin sum tryggjaði, at øll skuldu hava rætt til at velja uttan mun til húðalit.

Tað hevur verið ein drúgvur kampur, og byrjaði hann fyri umleið 21 mánaðum síðan. Eitt ótal av fólki, ung sum gomul, hava arbeitt ótroyttiliga hesa tíðina, tey flestu sjálvboðin. Øll vita, at nógvur peningur skal til, tá ið ein bjóðar seg fram sum forsetavalevni. Her er so internetið komið inn í spælið, og undirtøkan hevur verið heilt ótrúlig. Sponsorarnir vóru fáir í fyrstani, men fólk góvu tað, tey høvdu ráð til, ofta bert 5-10$. Undirtøkan vaks, og í miðal hava fólk givid 89$. Men tá ið milliónir av fólki geva, verður tað nógv tilsamans.

Barack Obama er ein óvanligur persónur við ómetaliga góðum gávum. Hann inspirerar og gevur fólki vón og vilja. At síggja, hvussu fólk reageraðu týskvøldið, tá ið avgerðin kom, var stórt. Har vóru gleðistár og dansur í gøtunum. Røðan hann helt í Grant Park í Chicago, har 250.000 fólk vóru samlað var einastandandi. Hann broyttist nú frá at vera valevni til at vera forseti, og ein var bergtikin.

Ein er ikki byrjaður at hugsa um, hvat hetta merkir, at ein littur ungur maður, sum vaks upp undir vanligum, ja, kanska smáum korum í Hawaii, nú stendur sum nývaldur forseti. Hetta er djúpt, bæði filosofiskt, politiskt og sosialt. Landið er broytt, og hetta er ein nýggjur dagur. Dreymurin, so leingi útsettur, er nú veruleiki," endar Diddan sína viðmerking.

Vit eru mong sum fegnast saman við henni.



*Sum ung genta í Washington hevði Diddan pass til Capitol, har hon millum onnur sá Edvard og Robert Kennedy*

**HER GÅR DET GODT...**




*Henda ofta beinrakna danska teknirøðin dugur væl at lýsa politisk viðurskifti. Her um leiklutin hjá teimum "høgrakristnu" í USA við eitt miðskeiðsval. Hesin taktikkur miseydnaðust hesa ferð*